

**Ása er í klæðum frá Juniik:**

Niðurdeilur: . . . . . .Designersmixcollection 799,–
Toppur (innanf.) . .Underglam 399,–
Toppur (uttaná) . . .Designersmixcollection 379,–

Jakki . . . . . . . . . . . . .Time Zone 799,–
Stivlar . . . . . . . . . . . .Sofie Schnoor 1549,–
Taska . . . . . . . . . . . .Mimic Copenhagen 149,–

Hálsprýði . . . . . . . .Jane Koping 299,–

**Rókur er í klæðum frá Skálki:**

Buksur: . . . .Jack n' Jones 699,–
Skjúrta: . . . .Item 499,–
Jakki: . . . . . .Selected 1595,–

Skógvar: . . .Puma 799,–
Belti: . . . . . .Bosswick 299,–

JUNIIK pb

**Petrina í Juniik um klæðini:**
– Hetta er tað allarnýggjasta, og tað, sum er tað hottasta úti í heimi. Tað er bæði rátt og feminint, við tað, at ein blonduniðurdeilur er settur saman við cowboystivlum og einum cowboyjakka. Hetta settið kann nýtast av damum ímillum 18-40 ár.
– Rákið beint nú spennir ógvuliga víða, tí alt kann mixast. Tú kanst seta alt saman, júst sum tú vilt hava tað - markið er bara í høvdinum.
– Niðurdeilar og cowboystivlar eru annars nógv at síggja í útlondunum.
***Mást hava:*** – Eg haldi at fólk skulu investera í einum ordiliga feitum cowboybuksum og einum lekrum skóm. Blusir og toppar kunnu saktans vera av bíligum merkjum, og gjarna second hand, tí tað skal man hava ráð at skifta ofta. Annars kann ein lekkur hondtaska eisini seta nýtt lív í eitt gamalt klædnasett.

**Hávardur í Skálki um klæðini:**

SKÁLKUR

– Hetta settið er eitt ógvuliga trendy sett, sum kanska er meiri til teir ungu. Hetta er eitt smart sett, t.d. til at fara í býin í. Hetta er nakað, sum vit fara at síggja nógv til framyvir, serliga stutti bikerjakkin.
– Tað er ringt at siga nakað um mótan júst nú, tí fólk skapa sjálvi trendin. Teir ungu dreingirnir tora nógv betri at lata seg í øðrvísi og spennandi klæðir enn t.d. vit gjørdu.
– Vit fara at síggja nógvar strípur, sum ganga tvørturum. Eisini skjúrtur við strípum og puntum fara at verða nógv at síggja.
***Mást hava:*** – Hevur tú einar cowboybuksur og ein klædningsjakka, so hevur tú faktiskt eitt sett til næstan alt, tí tú kanst seta tað saman sum tú vilt. Fert tú í eina blusu ella stríputa troyggju, so er tað gerandissligt og ungt, meðan ein skjúrta skapar ein meiri tilkomnan og meiri klassiskan stíl. So einar cowboybuksur og ein klædningsjakka haldi eg, man má hava óansæð aldur.

## *Harriet í Salong Zig-Zag styladi Ásu*

Fyrst var eitt serum fordeilt í hárið, fyri at fáa tað at síggja sunt og glansfult út. Síðani varð Pre Style Spray sproytað í hárið, fyri at gera tað lættari at seta, og fyri at verja tað. Hárið varð uppsett, við lokkum sum hingu niður ymsastaðni. Síðani var Firm Hold Hairspray sprayað í, fyri at fáa uppsetingina at halda. Øll hárproduktini eru av merkinum Trevor Sorbie
**Make-up:** natúrligir litir. Foundation frá Body Shop, eygnaskuggar frá H&M í brúnum litum. Á vippurnar smurdi hon Underwear For Lashes frá Origins, og aftaná eina svarta mascara frá Amplicils. Kinnarnir fingu Bronzing Powder frá Body Shop, og varrarnar vórðu teknaðar við liplinara frá Clinique, áðrenn Ultra Gloss Dior Addict varð smurt á.

## *Turið í Salong Zig-Zag styladi Róki*

Pre Style Spray var tað fyrsta, sum Turið sproytaði í hárið. Tað ger hárið lættari at seta og verjir tað ímóti hita, kulda og øðrum hárproduktum. Síðani var Straightening Balm, sum er eitt slættikrem við fyllu, fordeilt í hárið. Tað varð sett við Moulding Mud for Men og endaði við at sproyta Firm Hold Hairspray í, fyri at fáa frisuruna at halda. Øll hárproduktini eru av merkinum Tre

SALONG ZIG ZAG